ítróttur

Nr. 51 • mikudagur • 14. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Vestmenningar rigga til

Vinna vestmenningar dystin á Skála í kvøld, hava teir samstundis ognað sær FM-heitið heili fýra umfør undan kappingarloki

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Av teimum trimum fyrstudeildar dystunum, sum verða leiktir kring landið mikukvøldið, man áhugin helst vera størstur fyri dystin á Skála millum StÍF og VÍF. Her kunnu vestmenningar endaliga tryggja sær gullmerkini, sum gluppu teimum av hendi á seinasta leikdegi í fjør, og sum áskoðararnir síðani tá hava longst eftir.

At hetta so kann fell saman við eini hevnd fyri tapið í steypafinaluni man ikki minka um motivatiónina hjá VÍF leikarunum, og hesum er venjarin hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, eisini samdur í.

– Jú, tað er klárt, at vit allir eru sera spentir til dystin. Hetta er jú møguleikin hjá okkum at hevna tapið í steypafinaluni. At tað so har umframt eisini er dysturin, har vit kunnu avgera FM-kappingina ger tað so avgjørt ikki verri, so eg síggi onga orsøk til, at vit ikki skulu taka dystin sum eina seinnu finalu.

Júst finaludysturin í Coca-Cola kappingini er sum kunnugt einasti dysturin, sum VÍF hevur tapt hetta kappingarárið. Tí er helst eisini nærliggjandi at spyrja venjaran, um hann hevur lagt spæliætlanina nakað øðrvísi undan hesum dystinum, enn hann gjørdi í finaluni.

– Nei, tað haldi eg ikki. Sum so man einasta broytingin vera, at vit ætla at vinna dystin, sigur Hjalmar skemtandi. Hann leggur tó eisini afturat, at talan kanska verður um onkrar smávegis broytingar, men at einki soleiðis serligt er á skránni.

Tað man tað hinvegin vera hjá áskoðarunum, og Hjalmar sigur eisini, at hann roknar við, at heilt fitt av fólki fer at leita sær inn á Skála til dystin.

– Tað má mann so bara rokna við, at áhugin verður stórur. Vinna vit, so er gullið heima, og tað vildi sjálvandi verið hugaligt.

At enda leggur venjarin afturat, at hóast teir nú eru somikið nær gullmerkjunum, so ivast hann onga løtu í, at talan kortini verður um eina sera torføra uppgávu, sum liggur fyri framman hjá vestmenningunum.

– StÍF hevur kanska ikki havt so góð úrslit, síðani teir vunnu steypakappingina, men helst stavar hetta í stóran mun frá væntandi motivatión. Mikukvøldið ivist eg ikki í, at hesin meinbogin er burtur, og eg bæði vóni og rokni við, at áskoðararnir fara at fáa ein sera góðan og spennandi dyst, sigur Hjalmar Klein Olsen at enda.

Tjaldur í Havn

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir mikukvøldið. Báðir verða hesir í Havn, har Tjaldur vitjar hjá Neistanum.

Fyri bæði liðini hjá Tjaldri er galdandi, tey hava havt stóra framgongd seinastu dystirnar, men at tey enn ikki hava fingið gera enn eina roynd at broyta mikukvøldið, men um tað fer at eydnast, kann bert tíðin vísa.

Hjalmar Klein Olsen roknar ikki við, at VÍF fer at fáa nakað til gávus á Skála, men at talan verður um ein spennandi og undirhaldandi dyst, har gullið tó skal tryggjast

Dystirnir mikukvøldið eru hesir

1. deild kvinnur
18.15 Neistin-Tjaldur

1. deild menn
19.45 StÍF-VÌF
19.45 Neistin-Tjaldur

Herfølge undir strikuni

Superligan: Men fyri felagið hjá Jákupi Mikkelsen var tað ikki verri, at AB vann heimadystin ímóti AGF

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Mánakvøldið datt Herfølge niður um niðurflytingarstrikuna. Hetta gjørdist veruleiki, tá AB á heimavøllinum í Gladsaxe vann 2–0 á AGF. At AB fekk trý stig hevði við sær, at teir skiftu um pláss við Herfølge. Felagið hjá Jákupi Mikkelsen er nú á 11. og næstniðasta plássinum, og AB er á 10. plássinum.

Heimasigurin hjá AB kom kortini ikki heilt illa við hjá AB. Um AGF hevði vunnið trý stig, so hevði tað verið torført at ímyndað sær, at onnur feløg enn AB og Herfølge skuldu kappast fyri at sloppið undan næstaftasta plássinum. Herfølge hevur 17 stig, AB hevur 19 stig, og AGF hevur 20 stig.

Bæði í AB og í AGF hevur verið nógv á vási í vetur. AGF venjarin í fjør, Ove Christiansen, segði seg úr starvinum eftir ársskiftið. John Stampe, sum í áttati árunum var liðformaður og krumptappur á AGF liðnum, tók fyri fáum vikum síðani við venjarastarvinum.

Tá AGF í fyrrakvøldið var í Gladsaxe, hevði Ove Christiansen verið venjari hjá AB í ein lítlan mánað. Hann tók við, tá annar av venjarunum, sum høvdu ábyrgdina, tá AB síðsta summar spældi Europa Cup ímóti B36, bað um at vera loystur úr starvinum. Tað gjørdi hann, tí kona hansara var vorðin álvarsliga sjúk.

Í donskum fjølmiðlum varð undan dystinum róð fram undir, at talan fór at vera um harðligt botnstríð. Men soleiðis gekk tað ikki.

Bæði AB og AGF roundu at vísa hugflogsríkt og undirhaldandi fótbóltsspæl. Og hóast talan var um fyrsta landskappingardystin eftir langan vetrarsteð, so eydnaðist tað væl. AB kom á odda í 1. hálvleiki, eftir at Jan Michaelsen hevði brotið ígjøgnum í høgru og lagt skrátt út frá. Og í 2. hálvleiki staðfesti landsliðsmaðurin, Brian Steen Nielsen, sigurin, tá hann lyfti brotsspark upp í málhornið.

AGF menninir hildu lítið um brotssparksdómin, og sjónvarpsupptøkurnar styrktu teir í hugsanini, at talan var um skeivan dóm.

Tá tað restaði eitt korter bríkslaði dómarin fyri brotssparki til AGF. Samvitskubit, hildu fleiri, tí talan var kanska um minni brotsspark enn tað, sum AB hevði fingið. Men AGF fekk einki burturúr brotssparkinum. AB málverjin, Jan Hoffmann, tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan og fekk fatur á vánaliga skotinum frá Nocko Jokovic.

Haderslev ella Suðurjylland, sum teir nú rópa liðið, hevur bara sjey stig og tykist vera fokið. Sunnudagin skulu teir spæla ímóti AGF í Århus. Todi Jónsson og FCK hava aftur heimavøll hesa ferð.Teir fáa vitjan av OB og Johan Byrial Hansen. Jákup Mikkelsen og Herfølge hava heimavøll. Ímóti oddaliðnum úr Silkeborg skulu teir royna at fáa stig og harvið at lyfta seg upp um niðurflyt-ingarstrikuna. Hinir dystirnir eru hesir:
FCM–AB, Lyngby–AaB og so Viborg–Brøndby, sum verður ein rættur toppdystur.

Støðan, danska superligan

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Silkeborg	19	9	8	2	30	24	6	35
2	Viborg	19	10	4	5	34	18	16	34
3	Lyngby	19	11	1	7	33	33	0	34
4	Brøndby	19	10	3	6	47	25	22	33
5	FCK	19	8	7	4	31	17	14	31
6	FCM	19	8	6	5	32	28	4	30
7	OB	19	9	2	8	31	24	7	29
8	AaB	19	7	5	7	29	31	-2	26
9	AGF	19	6	2	11	27	38	-11	20
10	AB	19	4	7	8	26	29	-3	19
11	Herfølge	19	4	5	10	23	40	-17	17
12	Haderslev	19	1	4	14	19	55	-36	7

Hópurin

Føroyski landsliðshópurin til dystirnar móti Luksemburg og Russlandi er hesin

Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen B68, Rógvi Jacobsen KÍ, Jóhannis Joensen HB, Christian Høgni Jacobsen, Jens Martin Knudsen NSÍ, Jákup á Borg, Pól Thorsteinsson, B36, Uni Arge Akranes, Sámal Joensen, John Petersen Leiftur, Jákup Mikkelsen Herfølge, Johan B. Hansen OB, Julian Johnsson, Kurt Mørkøre Sogndal, Óli Johannesen Hviovre, Todi Jónsson FCK

Nógvir um boðið

Størsta yvirraskilsið í landsliðshópinum man vera, at Súni Olsen ikki er við í hópinum, umframt at liðskiparin, Jens Kristian Hansen, ikki hevur meldað seg kláran til dystin. Landsliðsvenjarin frøist um, at talið av landsliðsevnum tykist vera støðugt hækkandi

LANDSLIÐ
Jákup Mørk

Sum kunnugt skal A-landsliðið í fótbólti skjótt aftur í altjóða eldin, og landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, hevur nú úttikið teir 18 leikararnar, sum komandi mikudag fara av landinum. Fyrst til Luksemburg, har dystur verður 24. mars, og síðani til Moskva, har Russland er mótstøðuliðið hin 28. mars.

Tey árini, sum Allan Simonsen hevur verið landsliðsvenjari, hevur hann aloftast verið trúgvur mótvegis teimum spælarum, sum áður hava tænt honum, og úttøkan av hópinum hesa ferð er í so máta einki undantak. Onkur vildi kanska verið við, at Allan hevur verið ov trúgvur, og har við hildið onkrum lovandi navni uttan fyri.

Súni ikki við

Ein av nýggju leikarunum á landsliðnum í teimum fyrireikingum, sum hava verið, er Súni Olsen, sum í fjør fór til Hollands, har hann spælir við FC Zwolle í næst bestu deildini. Eftir øllum at døma gekk avbera væl hjá Súna í venjingardystunum, og millum annað skeyt hann tvey av føroysku málunum í Spania herfyri.

Hetta hevur tó ikki verið nóg mikið til at sannført venjaran um, at hann eigur at fáa kjansin her og nú. Hetta tykist ein heldur løgin avgerð, tá Súni samstundis átti at talst millum leikararnar, sum eru best fyri. Hollendska kappingin er farin ígongd, og teir báðar seinastu dystirnar er Súni eisini sloppin at royna seg á besta liðnum. Tvær feðrir á rað er hann skiftur inn í dysti, og somikið nær einum føstum sessi hevur hann ikki verið, síðani hann í fjør heyst flutti til Hollands.

Í stuttari viðmerking sigur Allan Simonsen, at tað at Súni ikki er við, er fyri seg ein positivur trupulleiki.

- Tað er rætt, at Súni spældi væl á ferðunum í vár, og tað er heilt givið, at hann er ein leikari, sum vit fylgja sera neyvt. Eg havi eisini verið í sambandi við fólk í Hollandi, og veit, hvørji framstig hann hevur gjørt. Lat meg annars leggja afturat, at hesin positivi trupulleikin ikki bert umfar Súna. Tað eru fleiri leikarar, sum trýsta seg framat, og tað er sera hugaligt hjá mær, sigur Landsliðsvenjarin.

Allan Simonsen fegnast eisini um, at Julian Hansen longu nú er førur fyri at spæla, eftir beinbrotið hjá sær, og peikar í hesum sambandi á, at hetta sjálvsagt førdi við sær, at talið av leysum plássum í hópinum minkaði við einum.

Annars kann viðmerkjast, at Jens Kristian Hansen enn ikki setir seg føran fyri at spæla á landsliðnum. Hann er nústaðni byrjaður at venja, eftir at hava drigist við skaða í stórutá.

Súni Olsen hevur givið landsliðsvenjaranum enn ein positivan trupulleika

Møtirød

Undir heitinum: "Eitt í Kristusi"
Í læraraskúlahøllini

Fríggjakvøld 16. mars kl 20:00
Talari: Pauli Høj

Leygarkvøld 17. mars kl 20:00
Talari: Dánial á Dul Jacobsen

Sunnukvøld 18. mars kl 18:00
Talari: Fríðtór Debes

Leygarkvøldið verður serligur dentur lagdur á at hetta er fyrsta fundarrøðin hjá Karisma. Í dag eru 8 samkomur við í evangeliska tiltakinum. Hesar eru: Filadelfia í Havn, Evangeliihúsið í Havn, Rhema í Havn, Betania í Skopun, Keldan í Skálafjørðinum, Lívsins Orð í Runavík, Zion í Vági og Saron í Vestmanna.

Øll eru hjartaliga vælkomin
KARISMA

Hjálparfólk til Verkstaðið Vón

Verkstaðið Vón søkir hervið eftir einum hjálparfólki at arbeiða í kantinuni 30 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1/4-01 ella skjótast tilber og er lønt samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið í 9/11 lønarflokki, lønarstig 14–20.

Hjálparfólkið má vera sinnað at arbeiða saman við einum bólki av menningartarnaðum arbeiðsfólki og í tí dagliga hjálpa og stuðla teimum at loysa ymiskar arbeiðsuppgávur so sjálvstøðugt sum gjørligt.

Á Verkstaðnum Vón arbeiða uml. 40 vaksin menningartarnað. Eitt av endamálunum hjá okkum er at skapa trivna og menning fyri tann einstaka.

Um tú ert áhugað/ur í starvinum og í at arbeiða saman við starvsfólki við ymiskum fakligum førleika og saman við menningartarnaðum, kanst tú senda eina skrivliga umsókn til

Verkstaðið Vón,
Box 2003,
165 Argir,
att.: Maud Wang Hansen, leiðara

í seinasta lagi 28/3-2001.

Um tú vilt hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Maud Wang Hansen ella til álitisfólkið Hedvig Davidsen á tlf. 314288.

Reingerðarfólk til Verkstaðið Vón!

Verkstaðið Vón søkir hervið eftir einum reingerðarfólki at arbeiða 20 t. um vikuna. Starvið verður sett 1/4-2001 ella skjótast tilber og er lønt sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Arbeiðsgevarafelagið.

Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður og er dagliga karmur um arbeiðslívið hjá uml. 40 vaksnum menningartarnaðum starvsfólkum teirra. Á staðnum er dagliga stórt og fjølbroytt virksemi millum kl. 8.00 og 16.00.
Arbeiðstíðin hjá reingerðarfólkinum verður sostatt uttan fyri hesi tíðarbil.

Umsøkjarin skal vera fleksibul og skal hava áhuga í at arbeiða á einum arbeiðsplássi í støðugari menning, og skal somuleiðis vera røkin og lættur at samstarva við.

Skrivlig umsókn verður send leiðaranum Maud Wang Hansen, Verkstaðið Vón, box 2003, 165 Argir, tlf. 314288 í seinasta lagi 28/3-2001.

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA